## Ráevnisvinnan álitið

Mikudagin verður ein ráðstevna í Nuuk um menningarmøguleikarnar hjá grønlendska vinnulívinum, og tá fara luttakararnir millum annað at viðgera eina frágreiðing, sum grønlendska arbeiðsgevarafelagið og ráðgevingarfyritøkan Cowi Consult for Arctic Business Network hava latið úr hondum. Í frágreiðingini verður millum annað víst á, at á hvørjum ári hvørva umleið 200 arbeiðspláss í fiskivinnuni, og at helst fara uppaftur fleiri í komandi árum. Eydnast tað ikki at finna arbeiðspláss aðrastaðni og serstakliga í ráevnisvinnuni, kann roknast við afturgongd í búskapinum, stendur í frágreiðingini.



## Framgongd í Japan

Nakrar fáar dagar eftir at Týskland og Framland boðaðu frá búskaparligari framgongd, komu somu boð úr Japan í morgun. Sagt verður, at framgongdin var 0,9 prosent í 2. ársfjórðingi, og sambært stjórnini bendir tað á, at landið er við at fóta sær eftir ta ringastu búskaparkreppuna síðani seinna heimsbardaga. Japan varð serliga meint rakt av kreppuni, og teir seinastu seks mánaðirnare undan 2. ársfjórðingi minkaði búskapurin meiri enn trý prosent. Stjórnin í Tokyo ávarar tó um, at enn er langt á mál, og at fleiri afturat mugu rokna við at missa arbeiðið.

# Herverk var helst barnalótir

**Sunnunáttina er umfatandi herverk framt móti kirkjuni og aðastaðni í Miðvági. Myndugleikarnir vóna, at hetta bara vóru barnalótir og ikki illvilji móti kirkjuni**

HERVERK
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



*Miðvágs kirkja fekk nakrar snddir sunnunáttina*
*savnsmynd*

Tá ið Hans Jørgensen, deknur í Miðvágs kikju møtti sunnumorgunin í kirkjuni at fyrireika gudstænastuna, var hann illa við. Sjey stórir steinar vóru tveittir inn gjøgnum rútar, og ein stólur í kirkjuni var eisini skamfílaður.

Deknurin boðaði beinanvegin kirkjuráðsformanninum frá, og politiið fekk eisini boðini.

Herverk er gjørt aðrastaðni í bygdini somu nátt.

Politiið veit framvegis ikki, hvør hevur framt herverkið. Onkur hevur hoyrt ein flokk av ungum fólkum, gentum og dreingjum, har á leiðini, men onnur fólk vita at siga, at okkurt annað herverk hevur verið gjørt fyrr um náttina.

Politiið í Vágum sigur, at tað í fleiri ár hevur verið heilt ókent í Miðavági við slíkum, men í seinastuni hava eisin verið nøkur innbrot, og felags fyri øll hesi innbrot hevur verið, at einki er stolið.

### Okkurt skal henda

- Líkt er til, at tað bara er gjørt, tó okkurt skuldi henda, og mín fatan er, at tað eru frustreraðir ungdómar, sum hava verið upp á spæl. Hugsast kann, at antin hevur summarfrítíðin verið teimum ov long, ella tey tímdu ikki aftur í skúla. Vit kunnu bara gita, sigur Michael Gram, politistur, sum fegin vil hava fatur á fólkunum fyri at siga teimum, at slíkt eiga tey ikki at gera.

### Lestur

Í Miðvágs kirkju var lestur, sum ætlað, og deknurin Hans Jørgensen hevði eina viðmerking til, sum hent var við kirkjuni um náttina við herverki á kirkjuna.

Eisini hann helt, at hetta mundu vera barnalótir, og at kirkjan ikki nakar rættur, sum dømir.

- Eru tað børn ella ungdómar, sum hava gjørt hetta, eiga vit at fáa fatur á teimum og hjálpa teimum heldur enn at døma tey. Hjálpa teimum, so tey ikki fara longur og gera naka verri senni, sigur Hans Jørgensen.

Herverkið forðaði ikki fyri, at stór konsert var í kirkjuni um kvøldið, og minst 140 fólk lýddu á Vestmanna kirkjukór, Rúna og Súsonnur Brattaberg og haraftrat ársins songrødd Biritu Poulsen.

## Fekk skaða í beinið

**Ein maður á motorsúkklu varð sunnukvøldið lagdur inn á Landssjúkrahúsið, eftir at hann hevði rent á ein bil**

FERÐSLUÓHAPP
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Eitt ferðsluóhapp hendi á Argavegnum sunnukvøldið umleið klokkan 18.

Ein motorsúkkla koyrdi suður eftir Argjavegnum, og frammanfyri súkkluna koyrdi ein bilur.

Tá ið bilurin skuldi snara, rendi motorsúkklan inn í bilin, og motorsúkklan datt.

Maðurin á súkkluni varð fluttur á Landssjúkrahúsið við skaða í beininum. Hvussu stórur skaðin var, veit løgreglan ikki í dag.

# Sleipaður til lands

**Tað einasta, sum løgreglan hevði at gera í sambandi við ovastevnuna, var at veita einum uppsteðgaðum báti í Nólsoyarfirði hjálp**

OVASTEVNA
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Illveðrið leygardagin hevði við sær, at lítil bátaferðsla var til Nólsoyar tann dagin.

Nógvir av báteigarunum, sum høvdu ætlað sær at hildið fram aftaná Regattasiglingina fríggjadagin, bundu bátarnar í Hósvík, og har vóru teir liggjandi. Í Hósvík var annars trongt hjá bátunum at sleppa út og inn, men tí tók havnameistarin sær av.

Leygarkvøldið steðgaði ein bátur upp í Nólsoyarfirði. Løgreglan sendi bjargingarbátin Lív út til bátin, ið varð sleipaður til lands.

